


– Størri virksemið uttanlands kann kompensera fyri minkandi føroyskum búskapi, og tí hava vit góðar vónir til 2005, og vit rokna við einum úrslitið á sama støði sum í fjør, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa

# Styrktur sparikassi skal tjena pengar uttanlands

**– Vit halda okkum fingið ein størri og sterkari sparikassa við at keypa Eik Bank í Danmark, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa, sum hevði metstórt avlop í fjør. Føroya Sparikassi verður ikki frameftir líka lætt ávirkaður av fiski og laksi, tí økt virksemi uttanlands kann mótviga afturgongd í føroyska búskapinum**

SPARIKASSI

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Føroya Sparikassi hevði sítt besta roknskaparár í fjør. 107,2 milliónir krónur lógu eftir í sparikassanum í einum ári, har føroyski búskapurin annars varð merktur av afturgongd.

– Vit eru nøgd við úrslitið, og útlitini fyri í ár eru góð, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa.

Úrslitið á 107,2 mió.kr. eftir skatt stendur seg væl í eini samanbering við 2003, tá ið sparikassin hevði eitt hall á 128,8 mió.kr. og 2002, tá ið hallið var 65,9 mió.kr.

– Vit hava forrentað eginpeningin við 13,6 prosentum eftir einum ári, og eginpeningurin er nú 826,7 mió. kr., ið gevur ein solvens fyri samtakið upp á 16,3 prosent, samstundis sum gjaldførið er sera gott.

## Søla og minni tap gav bonus

Føroya Sparikassi sigur grundraksturin hjá sær verða góðan, hóast rentuinntøkurnar minkaðu og útreiðslurnar til umsitingina vuksu eitt vet.

– Tá ið hugsað verður um umstøðurnar í føroyska búskapinum, so halda vit, at rentuinntøkurnar eru lítið minkaðar, og raksturin er bara kvinkaður eitt vet upp eftir, sigur Marner Jacobsen, forstjóri.

Tað, sum ger tann stóra munin í úrslitinum fyri 2003 og 2004, eru serliga burturleggingarnar og virðisjavnin av partabrøvum.

Avskrivingar og burturleggingar av skuldarum minkaði úr góðum 300 milliónum í 2003 og niður í 87 milliónir í 2004.

Virðisjavnin av virðisbrøvum og útlendskum gjaldoyra vaks úr 23 milliónum og upp í í góðar 86 milliónir. Hetta komst av, at Føroya Sparikassi í fjør seldi sín ognarpart í KB Bankanum í Íslandi, og tað gav eitt munandi ískoyti til inntøkurnar.

## Sparikassin sterkur sum Eik

Føroya Sparikassi kann líta aftur á eitt hendingaríkt ár, har ein høvuðshending var keypið av Kaupthing Bank A/S, ið nú eitur Eik Bank Danmark A/S.

Við keypinum gerst virksemið hjá Sparikassanum uttanlands meira sjálvstøðugt, samstundis sum virkisgrundarlagið hjá Sparikassanum verður víðkað og váðin spjaddur út um gongdina í føroyska búskapinum.

– Vit verða minni knýtt at gongdini í føroyskari fiskiella alivinnu, tí vit nú hava størri virksemi uttanlands. Sparikassin sær stórar møguleikar í íløgubankanum, sum hevur fleiri bein at standa á og eitt fullfíggjað útboð av tænastum at bjóða kundum sínum, sigur Marner Jacobsen.

– Størri virksemið uttanlands kann kompensera fyri minkandi føroyskum búskapi, og tí hava vit góðar vónir til 2005, og vit rokna við einum úrslitið á sama støði sum í fjør, sigur hann.

Eftir yvirtøkuna av Eik bankanum økist javnin hjá Sparikassanum sum samtak við stívliga 1,2 mia.kr., soleiðis at hann fer upp á slakar 6,5 mia.kr.

Nevndin í Sparikassanum skjýtur upp fyri aðalfundinum at luta út 5 prosent í vinningsbýti til teir umleið 8.700 partaeigararnar.

### FAKTA

**Lyklatøl fyri roknskapin hjá Føroya Sparikassa í 2004**

Ársúrslit: 106, 2 mió. kr.
Ogn tilsamans: 6.493,566
Eginpeningur ultimo: 826.700
Útlán: 5.052.785
Innlán: 4.195.076
Ábyrgdir: 276.665
Solvensprosent: 16,3
Útlán í mun til eginogn: 6,1
Fulltíðarstørv tilsamans: 203,1

# Gramex-gjaldið í Føroyum er serstakt

**– Vit gera serstakar avtalur í Føroyum, og prísirnir í Føroyum kunnu ikki samanlíknast við prísirnar hjá teimum ymsu rásunum í Danmark, heldur stjórin í Gramex, Bjørn Juell-Sundbye**

GRAMEX

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Vit hava gjørt eina avtalu við Rás 2, sum byggir á tað gjald, sum hevur verið í Føroyum í nógv ár. Tað ber ikki til at samanlíkna hesar prísir við tað, sum summar danskar útvarpsrásir gjalda.

Tað sigur stjórin í felagsskapinum Gramex, sum umsitir rættindini til tónleik fyri tónleikarar og plátufelög.

Tá ið almennar framførslur eru av tónleiki, krevur Gramex gjald fyri hesar framførslur, og eitt nú skulu føroysku útvarpsstøðirnar gjalda til Gramex fyri at senda tónleik.

Stjórin á Rás 2 er misnøgdur við, at Rás 2 skal gjalda fýra ferðir so nógvar pengar til Gramex, sum summar útvarpsstøðir í Danmark gjalda.

– Vit hava ymiskar prísir í Danmark, og summar útvarpsstøðir í Danmark gjalda meira enn aðrar. Tað støðið, sum er lagt í Føroyum, hevur verið í nógv, nógv ár, og tað byggir á avtalur, sum vit hava gjørt við føroysku útvarpsrásirnar, fyrst og fremst Útvarpið, sigur Bjørn Juell-Sundbye, stjóri fyri Gramex.

## Pengar koma aftur til Føroya

Petur Jacobsen, stjóri fyri Rás 2, heldur, at hansara rás hevur goldið alt ov nógvar pengar til Gramex, samanborið við tilsvarandi útvarpsstøðir í Danmark, og hann hevur biðið Mentamálaráðið venda sær til danska Kulturministeriet fyri at kanna málið.

– Meðan donsk lokalradio gjalda 46,60 oyru, skulu vit gjalda 1,89 krónur fyri hvønn minutt. Vit hava frá fyrsta degi av víst á okkara ónøgd við gjaldið, men at gjaldið var ymiskt í pørtum av ríkinum, høvdu vit ikki droymt um, og tað varð heldur ongantíð upplýst fyri okkum, sigur Petur Jacobsen.

Sambært stjóran í Gramex er tað einki løgið við, at ymiskir prísir eru galdandi.

– Vit hava trý øki, sum vit umsita – Danmark, Føroyar og Grønland – og prísirnir eru ymiskir. Eisini í Danmark eru fleiri ymiskir prísir, sum DR, TV2, handilsligu rásirnar og lokalradio gjalda. Tí ber ikki til at siga, at onkur hevur goldið ov nógv. Gjaldið verður bygt á avtalur, sum vit gera við tær ymsu útvarpsstøðirnar, sigur Bjørn Juell-Sundbye, stjóri fyri Gramex.

Hann leggur dent á, at ein stórur partur av pengunum, sum føroysku rásirnar gjalda til Gramex, verður goldin aftur til føroyskar útgevarar og tónleikarar.

– Í fjør goldu vit 234.000 krónur til Føroyar, og um gjaldið hjá føroysku útvarpsrásunum skal minka, ja, so minka eisini pengarnir til føroyskt tónleikalív, sigur Bjørn Juell-Sundbye.